## Tórshøll bøtt um dansiumstøðurnar

Í Tórshøll í Havn hava tey nú bøtt um dansiumstøðurnar við at umskipa miðhæddina. Dansigólvið er meira atskilt og vorðið nakað størri. Dansur er hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld. Sagt verður úr Tórshøll, at tey leggja dent á at hava góð orkestur, og tað fyrsta stóra dansitiltakið verður leygarkvøldið, tá X-Rays fara at spæla. Samstundis vera hølini í kjallarnum opin hvørt fríggjakvøld og leygarkvøld, har møguleiki er hjá teimum, sum ikki ynskja at gjalda atgongumerkið til dansin at hugna sær.

## Minningarhald fyri Stella Argus

Í sambandi við at fimmti ár eru liðin síðani Stella Argus fórst við allari manningini – 22 monnum, verður minningarhald í Kvívík sunnudagin 28. oktober kl 14. Minningarhaldið byrjar í gamla kirkjugarði, har standmynd, sum Hans Pauli Olsen, listamaður hevur gjørt, verður avdúkað. Aftan á minningarhaldið bjóðar kommunan drekkamunní Glæmuni, har øll eru væl komin, siga P/F Kimbil og Kvívíkar kommuna.

# G! festivalurin á húsagang

TÓNLEIKUR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

**Á rættarfundi í gjár var avgjørt, at felagið spf. G! Music skal tvangsupploysast, tí felagið er farið fallitt. Sostatt hongur G! festivalurin nú í einum klønum tráð. Samlaða skuldin er omanfyri eina millión krónur**



*Av tí, at skuldin av ársins G! festivali var ov stór, er smápartafelagið handan festivalin farið á húsagang. í gjár varð felagið strikað av skrásetingini. Skuldin er omanfyri eina millión krónur*

Tað er nú nakað liðið síðani, at Jón Tyril var í miðlunum og greiddi frá, at spf G! Music, sum er partafelagið handan G! Festivalin, var farið í gjaldssteðg.

Í gjár var málið fyri í skiftirættinum, og úrskurðurin var, at felagið handan G! varð tvangsupployst.

Peter Flügge, sum starvast sum fulltrúði í skiftirættinum, sigur, at tá feløg verða tvangsupployst kunnu tað vera fleiri grundir.

- Vanligastu orsøkirnar eru, at leiðslan ikki er lóglig, ella at felagið ikki megnar at svara hvørjum sítt, og koma við einum roknskapi, sum kann góðkennast, greiðir Peter Flügge frá.

Hann sigur, at tá feløg fara í gjaldssteðg, skal skiftirætturin taka støðu til hvat skal henda við felagnum.

-Spf G! Music hevur verið undir trotabúðarviðgerð, og úrskurðurin var, at felagið ikki megnar at skaffa tann peningin, ið restar í, og at tað tí skal strikast av skrásetingini. Felagið handan G! festivalin er sostatt ikki til longur, staðfestir Peter Flügge.

Hann sigur, at tað, sum var av peningi í felagnum, varð býtt ímillum kreditorarnar, og síðani varð felagið strikað.

### Skuldin omanfyri milliónina

Av tí, at felagið var eitt smápartafelag, er eingin persónur, sum kemur at hefta fyri skuldini.

- Poengið við at hava smápartafelag er, at tað ikki er nakar fysiskur persónur, sum kemur at hefta fyri skuldina. Fólkini handan partafelagið skulu seta 80.000 kr í, tí tað er kostnaðurin av at stovna eitt smápartafelag. Men útyvir tann peningin, er einki mist, staðfestir Peter Flügge.

Spurdur, hvørjar vánirnar fyri einum G!festivali komandi ár, eru, svarar Peter Flügge, at tað kann hann ikki úttala seg um.

-Hasum havi ongan møguleika at svara. Men eg kann siga við vissu, at tað verður so ikki við spf. G! Music, at G! festivalurin kemur á beinini komandi ár. Men tað er einki sum forðar fólkunum handan G! í at stovna eitt nýtt smápartafelag og royna aftur, sigur Peter Flügge at enda.

Hann vil ikki siga hvussu stór samlaða skuldin er, og heldur ikki hvørjir postar hava vigað tyngst í roknskapinum.

Sosialurin hevur finið upplýst, at hóast alt ikki er endaliga avgreitt enn, so liggur samlaða skuldin omanfyri eina millión.

Í næstum verður lýst í bløðunum, at kreditorar, ið hava pening tilgóðar í spf. G! Music, kunnu møta til ein fund og krevja sína ogn.

Vit hava roynt at fingið eina viðmerking frá Jón Tyril, høvuðsmanni handan G!, men hann var ikki at hitta áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Eivør konsert í Føroyum aftur

**Allan mánaðin á tamb hevur Eivør verið á konsertferð í Noregi. Í hesum døgum er hon í Danmark, og í komandi viku kemur hon til Føroyar at hava konsert**

TÓNLEIKUR
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialuirn.fo*



*Eivør Pálsdóttir fer komandi hósdag at hava egna konsert aftur í Føroyum. Hetta er fyrsta sjálvstøðuga konsertin hjá Eivør í Føroyum síðani 2004*

Frá 9.-21. oktober hevur Eivør havt fleiri konsertir kring Noreg. Fyrsta konsertin var sýnd á stóru norsku sjónvarpsrásini NRK. Tað var eisini NRK, ið skipaði fyri konsertunum. Konsertirnar vóru við bæði donskum, norskum og føroyskum tóneilkarum, har Eivør var einaumboð fyri Føroyar.

Ì gjár, í dag og í morgin hevur Eivør tríggjar konsertir á ymsum støðum í Danmark, áðrenn hon vendir nøsina heimeftir aftur, og hevur eina konsert í Føroyum. Eftir stutta steðgin í Føroyum gongur leiðin til Íslands, har Eivør skal hava eina stóra konsert í sambandi við, at íslendski Sparisjóðurin fyllir 100 ár. Hetta verður seinasta konsertin hjá Eivør í ár, tí í desember fer hon á vælumtókta jólatourin við DR Big Band, eins og hon fyrr hevur gjørt.

### Fyrsta konsertin síðani 2004

Hóskvøldið 8. november fer Eivør á pall í samkomuhøllini í studentaskúlanum í Hoydølum. Hetta er fyrsta Eivør-konsertin í Føroyum, síðani hon hevði útgávukonsert saman við Bill Bourne og jólakonsert saman við Pætur við Keldu í 2004. Síðani tað, hevur hon fleiri ferðir framført í Føroyum, men ikki havt sína egnu konsert.

Tá Eivør fer á pall komandi hóskvøld, hevur hon føroyskt orkestur við sær. Edvard N. Debess, Rógvi á Rógvu, Benjamin Petersen, Ása Wraae verða á palli saman við Eivør. Harumframt verða eisini Graham Henderson kemur úr Fraklandi at spæla keyboard og Chris Herzberger kemur úr Týsklandi at spæla violin.

Á konsertini fer Eivør at spæla løg av nýggjastu fløguni Mannabarn, eitt úrval av gomlum løgum, umframt nøkur heilt nýggj løg, sum ikki hava verið at hoyrt áður.

Tað verður bert ein konsert í Føroyum, tí longu fríggjadagin fer bólkurin víðari til Íslands at spæla.

Atgongumerki til konsertina í Hoydølum kunnu keypast á Kunningarstovuni í Havn og á Kunningarstovuni í Runavík frá mánadegnum 29. oktober. Tey, ið vilja á konsertina, mugu skunda sær, tí tað er avmarkað atgongd.